## Vandu skipsvanlukku

Íslendska bjargingartænastan og amerikanska sjóverjan høvdu fyrradagin eina felags venjing vestur úr bygdini Sandgerði. Endamálið við venjingini var at vita, hvussu best er at gera, um eitt ferðamannaskip rennir á eitt ísfjall einar 100 fjórðingar eystan fyri Hvarvið. Í venjingini vóru skip og flogfør hjá íslendsku sjóverjuni og eitt flogfar hjá amerikonsku sjóverjuni. Í venjingini var amerikanska flogfarið statt millum Labrador og Grønland og beyð sær til at hjálpa íslendingum at leita.



*Íslendsk sjóverjuskip vóru við í venjingini*

*Mynd: Vísir*

## Nógv rúsevn i og innbrot

Juli mánaður gjørdist tann strævnasti hjá rúsevnadeildini hjá íslendsku løgregluni samanborið við hinar mánaðirnar í ár. Løgreglan fekk ikki færri enn 163 mál um rúsevni í síðsta mánaði. Tað er tó ikki vist, at tað stóra talið sigur nakað um veksandi nýtslu, tí sambært løgregluni er eftirlitið hert munandi, og tað er helst høvuðsorsøkin til tað stóra talið í juli. Tað var nú ikki bara rúsevnið, sum gav løgregluni nógv at hugsa um í juli, tí hendan mánaðin vóru ikki færri enn 262 innbrot.

# Hjáveiða í føroyskum sjógvi er søga

**- Uppisjóvarskip hava onga hjáveiði í føroyskum sjógvi. Onkuntíð var stórur upsi uppi í veiðini í hetlandsrennuni í november/ desember, men svartkjaftakvotan er væl og virðiliga uppfiskað fyri ta tíð. So, hetta er søga, sigur skipari á uppisjóvarskipi sum heldur, at myndugleikarnir – heldur enn at leggja upp til gitingar – áttu at sett eftirlitsfólk umborð á skipini**

HJÁVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað nógva av tí, sum gitt verður um hjáveiði hjá føroyskum uppisjóvarskipum í føroyskum sjógvi, er humbukk og tvætl, sigur skipari, sum soleiðis vísir aftur, at nakað "myrkaspæl" fer fram í hesi vinnu*

*Mynd: Yngve Olsen*

Skipari á uppisjóvarskipi hevur vent sær til Sosialin eftir skriving um, at teir fólkavaldu nú aftur eru farnir at seta sjóneyku á tað, tey rópa møguliga hjáveiði hjá pelagisku skipunum.

- Tit, sum skriva, mugu ikki lata tykkum ávirka av upsafólki og snævurskygdum lokalpolitikki. Øll, sum lesa eina slíka grein um hjáveiði, taka alt til sín – við húð og hár.

### Nógv tvætl

Skiparin sigur, at tað nógva av tí, sum gitt verður um hjáveiði hjá uppisjóvarskipum í føroyskum sjógvi, er humbukk og tvætl.

- Eg vildi ynskt, at myndugleikarnir fyrst kundu funnið út av at sett eygleiðarar umborð hjá okkum, áðrenn teir sleingja um seg við pástandum – á tingi og í fjølmiðlum, sigur skiparin, sum heldur, at fjølmiðlafólk stundum eru ov skjót at taka slíkt fyri góða "vøru".

Hann vísir á, at ein stórur kassi kring Føroyar er bannaður fyri svartkjaftaveiði, eins og økir í ein útsynning úr Føroyum eisini eru tað.

- At kalla alt føroyska sjóøkið krevur rist í svartkjaftaveiði, og tað er slett ikki kannað, hvønn mun ristin ger.

Skiparin heldur tað vera í fínasta lagi, at myndugleikarnir á ymiskan hátt verja og ansa eftir okkara dýrari fiskasløgum.

- Men tað er óseriøst bara at sleingja okkurt út og mæla til krøv fyri uppisjóvarskip - fyri at geva ávísum monnum, ið kanska øvunda okkum í síni egnu neyð, eina tátu í munnin.

### Hjáveiðivandin

Skiparin á uppisjóvarskipinum vísir á, at tá ið ræður um hjáveiði, er fyrst og fremst neyðugt at vita, hvar og nær hjáveiðivandin er til steðar – og um hann veruliga er til steðar millum føroysk uppisjóvarskip í verandi líki.

- Stundum hava vit hjáveiði í íslendskum sjógvi og í altjóða sjógvi norðanfyri. Talan er um tosk í Íslandi og upsa og kongafisk í altjóða sjógvi norðanfyri.

Skiparin sigur, at føroysku uppisjóvarskipini hava onga hjáveiði í føroyskum sjógvi.

- Fyrr var onkuntíð hjáveiða í november/ desember í ein landsynning úr Føroyum. Hetta var á bládýpi móti hetlandsmarkinum. Talan var bara um stóran upsa. Men okkara svartkjaftakvota er væl og virðiliga uppfiskað, áðrenn vit koma har til. So, hetta er søga.

### Royndarloyvi

Hann heldur, at okkurt skip kanska átti at fingið eitt royndarloyvi til veiði eftir stórum uppisjóvarupsa í hetlandsrennuni.

- Hesin upsin hevði verið góður í mun til smáa upsan, sum veiddur verður inni á landgrunninum.

Skiparin hevur eina áheitan á tey, sum skriva bløð og gera tíðindasendingar.

- Vælsignaði, verið meira kritisk og spyrjið eisini fólk í uppisjóvarvinnuni, áðrenn illgruni verður sáddur um hjáveiði hjá hesum skipum.

Sosialurin veit, hvør keldan er, og vit kunnu upplýsa, at skiparin, vit endurgeva, er ein av okkara dugnaligastu í uppisjóvarvinnuni – umborð á einum av okkara bestu skipum.

# Faroe Seafood aðalfund í næstu viku

**Árligi aðalfundurin hjá Faroe Seafood hevur drigið út í summar, men nú er líkt til, at fundurin helst verður tíðliga í næstu viku**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ætlandi skuldi aðalfundurin hjá Faroe Seafood vera seinast í juni og síðan tíðliga í juli, men nú vit eru komin út í endan av august mánaða, hevur enn eingin aðalfundur verið.

Í apríl mánaða var eykaaðalfundur í Faroe Seafood, har felagið fekk nýggja nevnd og nýggjan nevndarformann, Richard Mortensen.

Nývaldi formaðurin segði eftir eykaaðalfundin, at felagið hevur gjaldføristrupulleikar, og at broytingar eru alneyðugar. Hann legði aftrat, at leiðslan í Faroe Seafood hevur fullan stuðul í nýggju nevndini.

- Støðan er álvarslig, men tað eru stórir framtíðarmøguleikar í fyritøkuni. Nú fara vit at hyggja at ymsum møguleikum, so lønsemi aftur kann skapast í fyritøkuni, segði tá nývaldi nevndarformaðurin.

Síðan nýggja nevndin í Faroe Seafood tók við, er ymiskt farið fram, og eitt nú læt fiskavirkið í Miðvági ikki uppaftur eftir summarfrítíðina.

### Í næstu viku

Richard Mortensen sigur við Sosialin í morgun, at aðalfundurin í felagnum helst verður hildin í komandi viku, mánadagin, týsdagin ella mikudagin.

- Júst, hvør dagurin verður, er ikki endaliga ásett enn, sigur nevndarformaðurin.

Richard Mortensen vil einki siga um úrslitið í farna ári, fyrr enn á aðalfundi felagsins.



*Richard Mortensen, nevndarformaður í Faroe Seafood*

*Mynd: Kári Mikkelsen*